**UTTAN ÚR HEIMI**

# Aftur ein tilburður við løgregluharðskapi

**Í Los Angeles eru seks løgreglumenn ákærdir fyri óneyðugan harðskap, og tveir starvsfelagar teirra í Oklahoma verða væntandi eisini ákærdir**

USA
*Árni Joensen*

Bert tveir dagar eftir, at myndir frá einari harðligari handtøku í Los Angeles fóru um allan heimin, komu myndir frá einum líknandi tilburði í Oklahoma City á sjónvarpsskíggjarnar og í bløðini.

Hesaferð vístu myndirnar tveir løgreglumenn í ferð við at handtaka ein 50 ára gamlan svartan mann, Donald Pete. Maðurin er stórur á vøkstri og vigar 136 kilo, so tað var ikki lætt hjá teimum báðum løgreglumonnunum at fáa hann niður at liggja. Men við at sláa hann 27 ferðir við stavinum eydnaðist tað til endans.

Eins og í Los Angeles vistu løgreglumenninir í Oklahoma City ikki, at at handtøkan varð sjónbandað, og myndirnar eru síðani vístar um alt USA og aðrastaðni í heiminum.



*Teir báðir løgreglumenninir uppi yvir tí 50 ára gamla Donald Pete í Oklahoma City. 27 ferðir slóu løgreglumenninir hann við stavum sínum*

*Mynd: Reuters*

Løgregluovastin í Oklahoma City gjørdi skjótt av og bað alt fyri eitt samveldisløgregluna FBI kanna tilburðin.

Frammanundan kannar ein serlig nevnd tilburðin seinasta vikuskiftið, tá ein løgreglumaður sló ein 16 ára gamlan svartan drong í Los Angeles í høvdið, eftir at hann fyrst hevði stoytt høvdið á dronginum ímóti løgreglubilinum. Seks løgreglumenn eru nú ákærdir í málinum.

Amerikanska løgmálaráðið hevur boðað frá, at tann harðliga framferðin hjá løgregluni mett sum eitt sera álvarssamt mál, og John Ashcroft, løgmálaráðharri hevur sent ein av sínum fremstu mannarættindaserfrøðingum til Los Angeles at taka lut í kanningunum av tilburðinum har.

# Umhugsa at leggja sak ímóti Sveits

**Fakfelagið hjá russisku flogskiparunum umhugsar at leggja sak ímóti sveitsisku myndugleikunum, sum hava givið russiska flogskiparanum skyldina av vanlukkuni yvir Suðurtýsklandi**

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen*

Longu stutt aftan á vanlukkuna søgdu sveitsiskir talsmenn, at flogskiparin umborð á tí russiska ferðamannaflogfarinum hevði skyldina av, at flogfar hansara og eitt flutningsflogfar stoyttu saman yvir Boden-vatninum í Suðurtýsklandi. 71 fólk, teirra millum 45 børn úr russiska býnum Ufa, doyðu í vanlukkuni.

- Leiðararnir hjá sveitsiska loftferðslueftirlitinum Skyguide komu við teimum fyrstu skuldsetingunum ímóti russiska flogskiparanum, áðrenn tær fyrstu kanningarnar vórðu gjørdar, segði formaðurin í russiska flogskiparafelagnum, Miroslav Boichuk, á einum tíðindafundi í Moskva hósdagin.

- Skuldsetingarnar vóru óhóskandi og boðaðu frá ókunnleika, segði formaðurin. Hann legði afturat, at tá tann endaliga frágreiðingin kemur, fer felagið at taka støðu til, um tað skal leggja sak ímóti tí sveitsiska talsmanninum, sum kom við skuldsetingini ímóti tí russiska flogskiparanum.

Samstundis sum sveitsisku myndugleikarnir høvdu hug at geva russiska flogskiparanum skyldina av vanlukkuni, boðaðu myndugleikarnir í Týsklandi frá, at tann russiski flogskiparin fekk bara 44 sekundir til at fyribyrgja samanstoytinum. Sveitsiska eftirlitið bíðaði alt ov leingi við at varskógva flogskiparan, søgdu týsku myndugleikarnir.

Russiska blaðið Komosolskaya Pravda sigur seg hava fingið fatur á teimum seinastu orðunum hjá teimum báðum flogskiparunum umborð á tí russiska Tupolev-flogfarinum. Men orðini eru av slíkum slagi, at tey kunnu ikki setast í blaðið, verður sagt.

# Krevja Musharaf frá

**Teir størstu politisku flokkarnir í Pakistan krevja nú, at landsins forseti, Pervez Musharaf, skal leggja frá sær.**

PAKISTAN
*Árni Joensen*

Teir stóru politisku flokkarnir í Pakistan kunngjørdu í gjár, at teir vilja hava eina sivila fyribilsstjórn, sum skal hava eftirlit við tjóðartingsvalinum, sum verður tann 10. oktober.

Pakistanski hægstirættur álegði herfyri Pervez Musharaf, forseta at skriva út val til tjóðartingið, og at valið skuldi haldast í seinasta lagi tann 12. oktober. Mikudagin kunngjørdi forsetin, at valið verður 10. oktober.

Andstøðuleiðararnir, fyrrverandi forsætisráðharrarnir Nawaz Sharif og Benazir Bhutto, siga, at tað er neyðugt at fáa eina sivila fyribilsstjórn at hava eftirlit við valinum. Tey hava sostatt ikki álit á, at sitandi hernaðarstjórnin skal hava eftirlitið. Nawaz Sharif, sum er formaður í Pakistansku Muslimsku Samgonguni, sigur, at valið hevur at kalla einki virði, skal ein hernaðarstjórn skipa fyri tí og hava eftirlitið við tí.

- Skulu vit hava eitt frítt og rættvíst val, má eftirlitið vera óheft, sigur Sharif.



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Mentamáladeildin** er deild í trivnaðarfyrisitingini og hevur umsitingina av tí partinum av føroysku skúlalóggávuni, ið við lógum um fólkaskúla, frítíðarundirvísing og øðrum skúlalógum eru lagdar út til kommununa.

Deildin hevur um hendi menta- og skúlamál, ítróttarmál og studningar.

Mentamáladeildin leggur til rættis og avgreiðir øll mál, sum verða løgd fyri mentamálanevndina.

Harumframt skipar deildin fyri hátíðarhaldi av ymiskum slag m.a., tá ið árligu heiðurslønirnar verða latnar. Skipar fyri listaframsýningum í Snarskivuni.

www.torshavn.fo

## Málsviðgeri til mentamáladeildina

**Nakrar høvuðsuppgávur eru:**
- málsviðgerð
- fundarfrásagnir
- at skipa fyri og hava fundir um menta- og skúlamál
- at samskifta við fólkaskúlarnar, musikkskúlan, kvøldskúlan, býarbókasavnið, kunningarstovuna, svimjihøllina, stadionøkið, ítróttarfeløgini og onnur feløg og einstaklingar, sum arbeiða við mentamálum
- projektarbeiði í sambandi við mentanarálitið
- arbeiði í sambandi við nýggju fólkaskúlalógina
- skrivari í gøtunavnanevndini

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving, teldukunnleika, duga føroyskt til lítar og kunna samskifta á enskum.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at umsøkjarin er áhugaður í mentanarøkinum, dugir væl at leggja til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast gjørligt. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við nógvum fjølbroyttum og mennandi uppgávum, har tú arbeiðir sjálvstøðugt og hevur møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, deildarleiðara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 25. juli 2002.

**Vit hava fleiri frátiknir bilar, ið verða seldir við stórum avslátri**

**Persónbilar & Pick-upar**



BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35
mazda

## Leigan

Tey, sum ætla at leiga Svimjihøllina ella Fimleikahøllina í Tofta skúla komandi vetur, verða hervið biðum at senda skrivliga umsókn til kommunuskrivstovuna í seinasta lagi 12. august 2002.

**Nes kommuna**

## Skipasmiðjan á Skála P/F

**søkir eftir leiðara til stáldeildina.**

**Starvið:**
Sum leiðari av stáldeildini á virkinum fær tú ábyrgdina av øllum faktekniskum spurningum. Leiðarin verður partur av leiðslu felagsins við tilvísing til tekniska leiðaran og stjóran. Leiðarin av stáldeildini skal saman við leiðarunum av hinum deildunum á virkinum og leiðsluni annars, vera við at menna virkið fakliga og tekniskt, somuleiðis sum hann skal viðvirka til at styrkja verandi virksemi og finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi. Leiðarin skal í samstarvi við onnur vera við til at samskipa arbeiðið á skipasmiðjuni til gagns fyri bæði viðskiftarfólk, starvsfólk og virkið sum heild.

Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**
- at skipa og leiða dagliga arbeiði á stáldeild virkisins.
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði, fylgja hesum upp og saman við leiðsluni annars samskipa ymisku arbeiðini frá byrjan til enda.
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga.
- at vera sjakformonnum, starvsfólki, kundum o.ø. til hjálpar í faktekniskum spurningum.
- at vera við í tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat viðvíkur tíð.

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- er skipsbyggjari ella hevur líknandi útbúgving.
- hevur royndir innan stál- og skipasmíð.
- hevur leiðsluroyndir sum formaður ella líknandi og dugir at skipa og leiða arbeiði til gagns fyri starvsfólk, viðskiftafólk og virkið.
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir.
- hevur evnir at greina sundur fakligar spurningar, viðgerða møguleikar saman við øðrum, taka avgerðir og seta hesar í verk.

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði í einum spennandi umhvørvi við góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.
Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 44 11 55.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

Skipasmiðjuna á Skála P/F
att.: Marni Olsen
FO-480 Skála.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 31. juli 2002.

SKIPASMIÐJAN Á SKÁLA

www.faroeyard.fo

skala@faroeyard.fo

P/f Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju og har starvast umleið 75 fólk .

Sosialurin

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo